# Býráðsvalið nærkast

TÓRUR AV KÁK OLSEN



Nú nærkast 11. november og býráðsvalið í Tórshavnar Kommunu. Óivað ynskja vit øll best møguligar umstøður fyri okkum og okkara nærmastu, tí fari eg at stilla upp til býráðsvalið 11. november. Eg fari at virka fyri at skapa best møguligu karmar fyri borgararnar í Tórshavnar Kommunu.

Eg fari at virka fyri:

**Fíggjarligum skynsemi**
Umheimurin er í einari stórari fíggjarligari kreppu og kommunan hevur brúkt óvanliga nógvar pengar á sínari fíggjarlóg seinastu árini. Hesir pengar hava verið væl brúktir, men nú er tíð at umhugsa og raðfesta sínar íløgur av nýggjum, so kommunan ikki endar í fíggjarligum óskili.

**Ungdóms politik**
Ætlanin er at skipa eitt ungdóms- og barnaráð, har teir yngru borgararnir í Tórshavnar kommunu hava møguleika at fáa síni sjónarmið fram. Og øll mál framyvir, sum hava við børn og ungdóm at gera, skulu viðgerast av hesum ráðnum soleiðis, at ungdómurin kann gera sína ávirkan galdandi í málum, sum koma teimum við. Hetta soleiðis at samstundis slepst undan, at 40-50 ára gomul, menn sum kvinnur, skulu siga ungdóminum, hvat hann vil hava. Læt ungdómin svara fyri seg!

**Ùtbúgving**
Tórshavn skal verða ein lestrarbýur, ið dregur vitanartunga vinnu og gransking at sær. Kommunan skal gera sítt til, at karmarnir hjá teimum hægri lestrarstovnunum í kommununi verða mundi betri.

Átak skal setast í verk fyri at fáa íbúðir til lesandi í Tórshavnar Kommunu. Hetta til at betra um viðurskiftini hjá lesandi, sum als ikki eru nøktandi í løtuni, og til at byrja at skapað eitt ordiligt lestrarumhvørvi í kommununi. Týdningarmikið er fyri kommununa at skapa lesandi eitt umhvørvi, har næmingar, lærarar og vinna kunnu finna saman og skapa dynamikkin, sum krevst til at lyfta býin inn í 21. øld.

**Fólkaskúlin**
Kommunan hevur skyldu til at røkja karmarnar hjá fólkaskúlanum og hesir karmar mugu betrast mundi. Kommunan hevur seinasta valskeið gjørt eitt munandi arbeiði og er í holt við at byggja nýggjan skúla á Løgmannabreyt. Harumframt hevur kommunan ætlanir um at byggja nýggjan skúla á Argjum og gera týðandi umvælingar á øðrum skúlum. Hesar ætlanir skulu haldast áfram. Ein góður fólkaskúli tryggjar eina góða framtíð.

**Vinna**
Ein sterk kommuna hevur eitt sterkt vinnulív. Arbeiðast skal við at betra um umstøðunar hjá vinnuni í kommununi. Hetta skal gerast við framvegis at menna arbeiðið hjá Vinnumenningardeildini hjá Tórshavnar Kommunu.

Betri samstarv og samskifti skal vera millum kommunu og vinnulív. Til at nøkta tørvin hjá vinnuni og fáa fyritøkur til sín, má kommunan rætta vinnuni eina hjálparhond.

Latum okkum saman skapa tað umhvørvið, har vit trívast best.

X við lista E 11. nov.!

# Ungdómur og frítíð

UNN HENTZE



Tórshavnar kommuna hevur seinastu árini gjørt nógv fyri at betra um umstøðunar hjá ítróttinum í kommununi. Allar flestu børn íðka eitt ella annað slag av ítrótti, men nógv av teimum gevast, tíanverri kann mann kanska siga, tá tey koma í tannárini.

Hvat er so at bjóðað teimum? Samkomurnar eru ótrúliga raskar at takað sær av teimum ungu, og tað frívilliga arbeiði í fer fram, er gull vert. Musikkskúli er, men har er langur bíðilisti, hølisviðurskiftini og arbeiðsumstøðurnar eru ikki nøktandi.

Tey tilboð ið eru, eru ikki nóg sjónlig, nógv ung vita ikki hvat ein kann ganga til.

Verið eg vald inn í býráðið vil eg arbeiða fyri at pengarnar og góðviljin verður fordeildur betur millum tey ungu, ikki so at skilja at ítrótturin skal verða fyri missmuni, als ikki.

Meiningarnar kunnu verða ymiskar um, hvørji øki tørvur er á at betra um, tí vil eg eisini arbeiða fyri at vit fáa sett eitt ungdómsráð, eins og vit hava eitt eldraráð, ið kann verða talirør hjá ungdóminum í kommununi.

# Er uttanríkispolitikkur føroyinga privatiseraður?

HØGNI HOYDAL



Føroyski uttanríkisráðharrin sigur nú alment í Dimmalætting, at John McCain verður ein betri forseti í USA fyri Føroyar, enn Barrack Obama. Grundgevingarnar eru, at McCain skal vilja “lata USA upp” mótvegis umheiminum, meðan Obama vil “lata USA meira aftur”.

Í sama viðfangi rósar Jørgen Niclassen alment Irak-krígnum, og leiklutinum hjá USA í hesum kríggi, og uttanríkisráðharrin fegnast um, at danska luttøkan í hesum kríggi “hevur latið dyr upp fyri føroyingum í USA”.

Sum formaður í størsta flokki á tingi, fyrrverandi uttanríkisráðharri og framsøgufólk í uttanríkismálum fyri Tjóðveldi, haldi eg, at hetta eigur at fáa eitt skjótt og greitt aftursvar í almenninginum:

Í fyrsta lagi er tað óbúgvið og lítið umhugsað av Jørgeni Niclassen sum uttanríkisráðharri at úttala seg partapolitiskt um amerikanska forsetavalið og amerikanskan politikk á henda hátt. Skal uttanríkispolitikkur viðgerast partapolitiskt, kundi Jørgen latið eitt framsøgufólk á tingi úttalað seg. Metingar og grundgevingar uttanríkisráðharrans hoyra eini farnari heimsmynd frá Kalda Krígnum til, og byggja als ikki á ta støðu, sum bæði heimurin og USA eru í, og tær stóru broytingar, ið liggja fyri framman í heimspolitikkinum. Slík úttalilsi kunnu ikki tæna føroyskum áhugamálum mótvegis USA, Evropa ella øðrum pørtum av heiminum.

Í øðrum lagi er tað sera átaluvert, at føroyski uttanríkisráðharrin rósar og stuðlar Irak-krígnum og tí uttanríkispolitikki hjá USA, sum hevur ligið til grund fyri hesum. Bæði í USA, í Irak og í øllum heimssamfelagnum, hava avleiðingarnar verið ógvusligar og kostað 10.000-tals mannalív. Í uttanríkispolitikki hevur tað verið spjaðandi og skapt øgiligar spenningar og ósemjur. Sjálvt fólk, sum upprunaliga stuðlaðu krígnum, hava nú ásannað, at ósannar grundgevingar lógu til grund, og at hetta var eitt stórt mistak. Eisini hevur kríggið isolerað USA, elvt til øktan terror og er partur av tí búskaparliga ruðulleika, heimurin nú stendur fyri. Og hvussu hetta skal “lata dyr upp fyri føroyingum í USA”, har meginparturin av øllum íbúgvum eru ímóti krígnum og tí støðu, tað hevur komið USA í, man í besta føri vera ein misskiljing hjá Jørgeni Niclassen.

Í triðja lagi úttalar Jørgen Niclasen seg sum uttanríkisráðharri ímóti samtyktum í Løgtinginum, tá hann nú stuðlar Irak krígnum og fegnast um, at vit eru drigin við í kríggið gjøgnum Danmark. Løgtingið hevur altíð gingið hart ímóti kríggi og føroyskari luttøku í hernaðarátøkum. Og Løgtingið samtykti í 2003 við stórum meiriluta at ganga ímóti Irak-krígnum.

At Fólkaflokkurin og Jørgen Niclassen hava aðra hugsan, er sín søk. At vit kunnu undrast á, at Fólkaflokkurin stuðlar donsku stjórnini, hóast hon gongur ímóti stóra meirilutanum á Løgtingi, eru vit kanska von við. Men sum uttanríkisráðharri skal Jørgen Niclassen umboða føroysku tjóðina úteftir, og sjálvandi fylgja meirilutanum á Føroya Løgtingi. Uttanríkispolitikkurin føroyinga kann ikki privatiserast.

# Býráðsval 2008 – Valskrá IV

SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN

*Tíðindaskriv*

**Sjálvstýrisflokkurin stillar upp til býráðsvalið í Tórshavn. Valfelagið hjá Sjálvstýrisflokkinum hevur í gjørt at tryggja at fólk fáa sama politikk uttan mun til, hvør verður valdur, og fyri at fyrireika og útbúgva valevnini til miðvíst býráðsarbeiði**

Sjálvstýrisflokkurin á Streymoynni stillar upp fýra valevni til býráðsvalið í Tórshavn 2008.

*Sjálvstýrisflokkurin sendur uppundir valið valblað út í Tórshavn.*

*Í blaðnum eru valskrá og boðskapur frá valevnum, valfelag og stillarum.*

*Sjálvstýrið væntar at til ber – við veljarans vælvild – at fáa tvey umboða vald í Tórshavnar Býráð.*

Valskráin í Tórshavn er í fimm punktum.

• Útbúgving
• Umhvørvi
• Umsorgan
• Umskipan
• Vinna

**Fjórða útgreiningin er av umskipan:**

**Umskipan**
• Skil á kommunalu fyrisitingina
• Beinleiðis valdan borgmeistara
• Breiðar semjur heldur enn samgongu móti andstøðu
• Samanleggingar eftirmetast
• Fleiri býráðslimir

Í Tórshavnar kommunu skal borgmeistarin ikki býta út hvørt grundstykki og hvørja grindalykkju. Rættarstøðan skal ikki valdast, hvønn tú kennir. Greiðari mannagongdir, betri alment innlit, fullgóð kunning á heimasíðu, betri grundgevingar og greiðir kærumøguleikar skulu skipast.

Borgmeistarin eigur at vera beinleiðis valdur at standa á odda fyri útinnandi valdinum hjá kommununi. Um hetta ikki verður skipað beinleiðis í kommunulógini, skal nývalda býráðið skriva út vegleiðandi fólkaatkvøðu beint eftir býráðsvalið.

Valda býráðið skal umrøða øll mál nøktandi og royna at finna breiðar og varandi semjur, uttan nakra djúpa gjógv ímillum samgongu og andstøðu.

Bygdunum uttanum Havnina má tryggjast nóg gott tænastustøði og viðvirkan í politisku tilgongdini. Tí mugu samanleggingarnar eftirmetast og tær fólkavaldu lokalnevndirnar styrkjast.

Tórshavnar kommuna eigur at hava fleiri býráðslimir. Skal kommunan hava nærdemokrati, má í minsta lagi ein býráðslimur vera fyri hvørjar túsund íbúgvar.

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# Til Málnevndina

DAGFINN S. HØJGAARD
Tórshavn

Er navnið F. C. Hoyvík meira óføroyskt enn A. C. Evensen?

Hvussu æt A.C. Evensen í veruleikanum? Eru nógv ungfólk í Føroyum í dag, sum vita, hvat goymir seg aftan fyri styttingina A. C? Eg veit so ikki, kenni bara mannin undir heitinum A. C.Evensen.

Eg fari ikki at hugsa ‘Football Club Hoyvík’ tá eg síggi ‘FC Hoyvík’, eg fari bara at hugsa tað sum eg síggi, nevniliga FC Hoyvík.

Annars kunnu tit í Málnevndini loysa handan trupulleikan við at ‘legitimera’ bókstavin C sum lógligan í føroyskum nøvnum og heitum. So er trupulleikin við at skula taka støðu til, um Victor kann stavast við c ella ei, burtur, eina ferð með alla.

Tá føroyingar hoyra Seyðabrævið nevnt, so munnu flestu hugsa um nakað ‘rótføroyskt’. Men Seyðabrævið er fult av c’um. Er Seyðabrævið so at rokna sum óføroyskt? Hví so alt hóvastákið við at fáa tað heimaftur til Føroya?

Hví er upprunanorrøni bókstavurin C ein so stór hóttan móti føroyska málinum? Tað lysti mær at vita.